# Blikur er meistari

**Mangan hevur verið tætt frammi í oddinum, men tá av er tornað, hevur Blikur av Argjum verið vinnandi báturin næstan hvørjaferð. Bert á Norðoyastevnu máttu teir taka til takkar við øðrum plássinum. Á Vestanstevnu var um reppið at teir vunnu, men ein øgiligur endaspurtur tryggjaði sigurin – og meistaraheitið**

5-MANNAFØR, DREINGIR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

### TÍÐIR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 04.52.00 |
| 2 | Fípan Fagra | 04.52.22 |
| 3 | Havfrúgvin | 04.53.00 |
| 4 | Spógvin | 04.55.01 |
| 5 | Tekla | 04.56.22 |
| 6 | Firvaldur | 04.57.03 |
| 7 | Drekin | 04.57.20 |
| 8 | Sílið | 04.59.00 |
| 9 | Tjaldrið | 05.03.16 |
| 10 | Svanur | 05.04.05 |
| 11 | Kollur | 05.05.21 |
| 12 | Royndin Fríða | 05.06.01 |

Eftir at startdómarin hevði skotið, mundu tað vera fleiri, ið vórðu tikin av bóli av raðfylgjuni, sum fimm-mannaførini lógu í. Tað vóru nevniliga Havfrúgvin, Spógvin og Drekin, sum leingi myndaðu oddafeltið í róðrinum. Drekin, sum ikki hevur vunnið nakran róður enn, legði seg rættiliga tíðliga á odda, og eitt langt petti av teininum økti hann spakuliga um leiðsluna. Hinir bátarnir fylgdu væl við, men eitt skifti hevði Drekin allar menninar leysar.

Brátt tók møðin yvir hjá Drekamonnunum, og teir orkaðu ikki at halda leiðsluna. Havfrúgvin, Fípan Fagra, Spógvin og Blikur fóru skjótt framvið, og hesir bátarnir myndaðu nú oddafeltið.

Tá farið var um 500 metrar, tóku Blika dreingirnir sær annað skinn um bak og spentu í. Hetta gav eisini úrslit. Enn var spenningurin tó sera stórur, tí hinir bátarnir vildu ikki gevast so. Leingi hildu teir tørn og góvu Bliki harða kapping. Í endaspurtinum vísti Blikur tó hví júst teir eru meistarar. Teir tóku nøkur øgilig tøk, og sluppu sær framum, so róðursmaðurin tryggur kundi stýra Føroyameistaraheitið í hús.



## Vælnøgdir við róðurin



Jón Kamar, Eli og Benjamin rógva allir tríggir við Fípuni Føgru úr Klaksvík. Teir endaðu á einum øðrum plássi bert lítlan skut aftan fyri Blik av Argjum.

– Vit eru nøgdir við róðurin í dag, eru teir tríggir á einum máli um.

Men samstundis siga teir, at starturin hjá teimum ikki var av teimum bestu.

– Vit hava sjáldan góðan start, sigur Jón Kamar, og hinir nikka samtykkjandi.

Hetta var triðju ferð, at Fípan Fagra kom inn sum nummar tvey, men hetta var fyrstu ferð, at teir vóru so stutt frá fyrstaplássinum.

– Vit hava verið sera svingandi í ár, men í dag var rættuliga spennandi, siga teir.

Vestanstevnuróðurin hevur givið teimum gott mót, og vóna teir, at tað fer at eydnast teimum at vinna á ólavsøku.

– Tað hevði verðið ein super endi á hesum kapp-róðrarárinum, siga teir tríggir Jón Kamar, Eli og Benjamin.

**- sae -**







*Blikadreingirnir vístu við einum fantastiskum endaspurti, hví júst teir í dag kunnu kalla seg føroyameistarar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*





*Nólsoyingur kom fyrst á mál og fór sostatt tvey stig framum Havnarbátin, sum varð nummar tvey á Vestanstevnu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Einki er avgjørt enn

**10 mannafarsróðurin verður av summum skýrdur at verða 1. deild innan kappróður og hesin róðurin man uttan iva verða tann, ið dregur flestar áskoðarar. Í ár fáa áskoðararnir spenning fyri allar pengarnar, í øllum førum teir, ið halda við Nólsoyingi og Havnarbátinum, sum liggja ávikavist nr 1 og 2 í FM kappingini. Bíðast má til Ólavsøkuna at finna vinnaran**

10-MANNAFØR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin*

### TÍÐIR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 08.57.01 |
| 2 | Havnarbáturin | 09.00.12 |
| 3 | Vágbingur | 09.01.00 |
| 4 | Eysturoyingur | 09.02.07 |
| 5 | Vestmenningur | 09.04.22 |
| 6 | Hoyvíkingur | 09.06.02 |

Undan Vestanstevnuni vóru teir púra javnir í stigum, hin hvíti báturin úr Havn og hin svarti úr Nólsoy. Báðir hava róð væl ígjøgnum alla kappingina, og hóast Havnarbáturin kanska fekk eina betur byrjan við at vinna Norðoyðastevnu og Eystanstevnu, so kom Nólsoyingurin sterkt aftur eftir Sundalagsstevnuna, har hann fekk fyrsta sigurin á árinum. Á Fjarðastevnuni tók hann Havnarbátin aftur í seinastu tøkunum, og á Vestanstevnuni fekk hann aftur ein sigur til Nólsoyar.

Men hóast spenningur er um hvar FM-heitið man fara at enda, so var nærum eingin spenningur í 10-mannafarsróðrinum á Vestanstevnuni. Tað syrgdi manningin á Nólsoyinginum fyri. Tað var sera tætt ímillum bátarnar fyrsta strekkið eftir startin, men rættiliga skjótt legði Nólsoyingurin seg á odda, og hann helt leiðsluni líka inn um mállinjuna. Havnarbáturin og Vágbingur eltu hann allan vegin, men megnaðu aldri at hótta leiðsluna.

Vágbingar prógvaðu enn einaferð, at sigurin á Jóansøku ikki bert kom orsakað av eini aldu, sum onkur vildi vera við, men at dugur veruliga er í teimum.

Táið bátarnir nærkaðust mállinjuni, øktu Nólsoyingar um leiðsluna, og vóru púra leysir, táið skotið small. Spenningurin í róðrinum var sostatt um annað plássið. Tað kundi fara til bæði Havnarbátin og Vágbing, sum vóru sera jávnir tá 50 metar vóru eftir. Men Havnarbáturin dróg longra stráðið og fekk togað seg framum í seinastu tøkunum.

Sostatt er Nólsoyingurin 2 stig á odda, nú bert Ólavsøkan er eftir av kappingini. Vinnur hann aftur tá, fer meistaraheitið til Nólsoyar. Vinnur Havnarbáturin harafturímóti, koma teir ájavnt Nólsoyingin í stigum, og tá so er, verður tað báturin, sum vinnur ólavsøkuróðurin, ið gerst meistari. Havnarbáturin skal vinna á Ólavsøku fyri at vinna FM, meðan Nólsoyingur bert skal vera frammanfyri Havnarbátin. Enda bátarnir javnir í stigum, uttan at annar teirra vinnur, verður Nólsoyingur FM-vinnari, tí teir hava vunnið 3 róðrar, meðan Havnarbáturin bert hevur vunnið 2. So tað verður spennandi at síggja hvør verður fyrstur á mál, eftir teir knapt 1000 metrarnar á Havnarvág.



*Nólsoyingur var meira enn eina bátslongd frammanfyri Havnarbátin, tá farið varð um málið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Vágbingar vóru væl við ígjøgnum allan róðurin, men megnaðu tá samanum kom tó ikki meira enn eitt triðja pláss*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jógvan Jacobsen, róðursmaður á Havnarbátinum:

## Nú er tað upp til okkum



– Vit fylgdust væl inn á 1000 metrar, men teir fóru frá okkum, tá einir 700 metrar vóru eftir. Vit vistu, at um vit megnaðu 2. plássið, so var alt enn púra opið, so tað løgdu vit okkum eftir. Vit sóu at vit ikki kundu taka Nólsoyingin aftur. Táið vit komu inn um málið, vóru vit í iva um tað vóru vit ella Vágbingur, sum blivu nr 2, so vit vórðu glaðir tá vit funnu útav, at tað vóru vit, segði Jógvan Jacobsen eftir róðurin.

– Fram til Ólavsøkuna fara vit at hava somu venjing, sum vit hava havt allatíðina. Kanska eitt sindur harðari nú, fyrstu vikuna, men annars tað sama. Vit hava góðar vónir um at klára teir á ólavsøkuni, tí tað er jú so javnt.

**-eys-**

Reidar Jacobsen á Nólsoyingi:

## – Vit vinna



– Vit eru væl nøgdir í dag, vit kunnu ikki vera annað. Vit høvdu ikki ein serliga góðan start, men vit vunnu tað innaftur, so tað var í lagið, sigur Reidar Jacobsen.

– Tað gekk ikki so væl fyrst í kappingarárinum, men nú eru vit farnir at trúgva uppá okkum sjálvar, og at stóla uppá tað, sum vit gera. Tí gongur tað betri nú. Vit vita, at vit skulu vera frammanfyri Havnarbátin á Ólavsøkuni, so eru vit meistarar.

Hann sigur, at venjingin hjá Nósloyingi verður tann sama, sum hon hevur verið higartil, tó kanska eitt sindur harðari.

– Á seinastu stevnu stevnu prógvaðu vit, at vit eru grovir á 1000 metrum, so... Ja, vit vinna á òlavsøku, staðfestir hann at enda.

**-eys-**